ítróttur

Nr. 2 • hósdagur • 4. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jákup er í sera hørðum stríði

**Eddie Gustafsson, sum stríðist fyri at sleppa við svenska landsliðnum til HM endaspælið, hevur vunnið stríðið um plássið millum stólparnar hjá Molde – fyribils í hvussu so er**

TIPPELIGAN NOREG
*Jóannes Hansen*

Fyrsta umfarið í norsku landskappingini verður í hesum vikuskiftinum. Allir dystirnir uttan ein verða spældir í morgin. Ein dystur verður spældur í dag. Tað er tann millum Molde og Brann Bergen. Hann verður spældur í Molde, og hann verður beinleiðis sjónvarpaður í kvøld klokkan seks føroyska tíð.

Men fótbóltshugaðir føroyingar skulu ikki rokna við at síggja Jákup Mikkelsen í Molde málinum í kvøld. Tað roknaði Jákup Mikkelsen ikki við, tá vit høvdu hann í telefonini úr Molde í fyrrakvøldið:

– Um alt verður, sum tað hevur verið inntil í kvøld, so fari eg at sita á beinkinum í fyrsta landskappingardystinum. Eddie Gustafsson hevur verið fyrsti málverji nógvu tær seinastu ferðirnar, og hann verður málverjin ímóti Brann.

Hetta staðfestir Jákup Mikkelsen. Hann ásannar, at tað er ikki tí, at hann ætlaði sær at sita á beinkinum, at hann undan jólum gjørdi nýggjan sáttmála við Molde, men hann heldur eisini, at hann kendi treytirnar, tá hann skrivaði sáttmála:

– Eg visti longu tá, at Molde hevði skrivað sáttmála við Eddie Gustafsson, og eg visti, at hann er ein góður málmaður. Men eg var sinnaður at kappast við hann, og tað eri eg enn. Felagið vildi hava tveir málverjar, sum teir kundu rokna við, og tað siga teir seg vera nøgdar við. Men eg ætli mær ikki at geva skarvin yvir í hesi kappingini.

Nær gjørdist tú greiður yvir, at Gunde Bengtsson, venjarin, heldur vildi hava landsmannin hjá sær í málinum, enn at tú skuldi halda fram sum fyrsti málverji?

– Tað var, tá vit herfyri vóru í Farum í Danmark á venjingarlegu. Inntil tá høvdu vit spælt so at siga aðru hvørja ferð. Og tá eg sjálvur skal siga tað, so haldi eg, at tað hevur gingið væl hjá mær, síðani vit eftir jól fóru undir aftur venjingarnar. Men venjarin skuldi taka annan framum hin. Tá vit vóru í Danmark spældu vit ímóti Farum og ímóti svenska Helsingborg. Tá var Eddie Gustafsson í málinum í báðum dystunum, og síðani hevur hann verið fyrsti málverji, sigur Jákup Mikkelsen.

Luturin hjá næstbesta málverjanum í Molde er – umframt at vera klárur á beinkinum – at spæla á næstbesta liðnum. Teir eru í 2. deild, sum er triði besta deildin.



## Sjúkur í vikuskiftinum

Síðsta sunnudag spældi Molde síðsta venjingardystin, áðrenn tað í kvøld verður álvari og stríð um stig og plaseringar. Dysturin var á heimavølli ímóti Odd. Gestirnir vunnu 1–0, og Molde spældi ikki væl.

– Tað gjørdi kanska einki. Í nógvum venjingardystum hevur tað gingið sera væl. Dysturin var ein áminning um, at einki kemur av sær sjálvum. So kanska verður hugburðurin tann rætti, tá Brann kemur higar leygarkvøldið, heldur Jákup Mikkelsen.

Eddie Gustafsson var í málinum hjá Molde, men hann spældi bara fyrra umfarið. So varð hann skiftur út, og norsku fjølmiðlarnir vistu at siga, at hann var skaddur. Tað plagar at verða tikið til, at eins deyð er annars breyð. Kortini var tað ikki Jákup Mikkelsen, men heldur triði málverjin Knut Lillebakk, sum í 2. hálvleiki loysti av.

– Eddie Gustafsson fekk ein løst í lærið, tá hann rendi saman við einum av verjuspælarunum. Men skaðin var ikki álvarsligur. Hann hevur vant í vikuni, og hann er klárur at spæla.

Men tað var ikki tú, sum loysti av?

– Nei, eg legðist sjúkur hósdagin í síðstu viku. Eg sá dystin sunnudagin, men eg var ikki til venjingar aftur fyrrenn týsdagin.

Er tað nakar ivi um, at tú ert nummar tvey?

– Nei, tað siga teir ikki. Molde hevur roynt at leiga Knut Lillebakk út. Hann hevur royndarvant við trimum feløgum, men higartil er eingin avtala gjørd við nakað felag.

## Hevur nógvar dygdir

Tá vit spyrja Jákup, hvørjar dygdirnar eru hjá kappingarneytanum til plássið millum stólparnar hjá Molde, so hevur hann nógv rósandi orð at siga um Eddie Gustafsson:

– Hann er 25 ára gamal, hann er stórur og sterkur, hann er tryggur í luftspælinum, og hann dugir ógvuliga væl at seta skjót álop í gongd.

Betri enn tú?

– Útkøstini hjá honum eru sum tey hjá Schmeichel. Hann megnar væl og neyvt at tveita bóltin einar fimtan til tjúgu metrar inn á helvtina hjá mótstøðuliðnum. Tað ber við sær, at Molde gerst vandamikið í snarálopum, áðrenn mótstøðuliðið er komið í verjustøðu.

Eddie Gustafsson kappast m. a. við Magnus Kilhlstedt, málverjan hjá FCK, um pláss í svenska ferðalagnum, sum skal til HM endaspælið í Japan og Suðurkorea. Jákup Mikkelsen ivast ikki í, hvør av hesum báðum er tann betri málverjin:

– Eg hevði heilt víst tikið Eddie Gustafsson framum. Hann vísir støðug avrik. Mistøkini eru heilt fá og smá, og tað hevur sera stóran týdning.

Um Eddie Gustafsson fer við svenska landsliðnum til HM endaspælið, so verður tað heilt víst brúk fyri Jákupi Mikkelsen í málinum hjá Molde. Tí kunnu vit ikki annað enn ynskja kappingarneytanum hjá føroyska málverjanum alt tað besta í landsliðsstríðnum.

## Sáttmála til november 2003

Jákup Mikkelsen og familjan trívast hampuliga væl í Molde. Umstøðurnar at búgva og liva eru góðar, men í Molde hevur tað ikki verið nakað serligt at fyrireika seg til nýggja kappingarárið:

– Vit hava havt nógvan kava. Molde hevur bara ein gras venjingarvøll. Har hevur ligið 40 cm tjúkkur kava inntil fyri heilt kortum. Tað hevur havt við sær, at vit hava verið noyddir at vant aðra staðni. Í hesi vikuni hava vit verið tvær ferðir í Missund, har teir eiga ein góðan grasvøll, sum ikki hevur verið so vátur sum okkara venjingarvøllur. Vit hava siglt eitt korter við ferju, og so hava vit koyrt tjúgu minuttir í bussi, áðrenn vit eru komnir til venjingarvøllin. Seinnapartin fríggjadagin rokni eg við, at taktiska venjingin fer at ganga fyri seg á stadion. Tað er hiti í tí vøllinum, og hann var góður, tá tað sunnudagin varð spælt á honum.

Hvussu leingi verður tú í Molde?

– Sáttmálin, sum vit undirskrivaðu í heyst, fevnir um hetta og komandi ár. Tað vil siga, at eg verði leysur 1. november 2003. Men tað er ein klausulur í, sum ger, at tað ber til at sleppa burturúr sáttmálanum í heyst, um eg ikki havi spælt serliga nógv, men tað vóni eg ikki fer at gerast aktuelt, heldur Jákup, sum í prátinum vísir sinniligu styrkina, sum er neyðug, um tað skal bera til at vera ítróttarmaður á hasum støðinum.

## Vónirnar

Í norskum bløðum hevur verið nógv skrivað og mett um, hvussu tað fer at vignast í nýggja kappingarárinum. Meistaraliðið úr Tróndheimi verður enn eina ferð roknað sum besta boðið upp á NM, og so verður gitt, at Lillestrøm og Molde fara at verða størstu kappingarneytarnir til fremsta plássið.

– Eg haldi, at Rosenborg framvegis eigur besta liðið í Noregi. Tí eru teir favorittar. Hinum liðunum kunnu vit vinna á – øllum somlum. Men vit hava í venjingardystunum víst, at tá tað gongst illa, so er spælið so út av lagi, at vit kunnu tapa ímóti nógvum liðum. Tað hava vit ikki ráð til. Um vit skulu røkka málinum, sum undir øllum umstøðum er at sleppa við í Europa Cup, so mugu vit sýna støðug avrik, heldur Jákup Mikkelsen.

Í fyrsta umfarinum í tippuliguni í ár spæla Molde og Brann í dag. Í morgin verður spælt soleiðis: Bryne–Lyn, Lillestrøm–Viking, Moss–Sogndal, Rosenborg–Odd, Start–Stabæk og Vålerenga–Glimt.



# Nú stendur á

**Meðan tey trý oddaliðini í bólkaspælinum tykjast hampuliga vís í at staðfesta oddastøðuna í teimum báðum seinastu dystunum, er spenningurin um annað og triðja plássið stórur**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Bert tvey umfør resta nú í, áðrenn funnið er fram til, hvørji lið fara at spæla fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið.

Í onkrum bólkum hava lið longu tryggjað sær atgongd til fjórðingsfinalunar, men tað er ikki líka mikið, um hetta verður sum vinnari av bólkinum ella ikki. Teir tríggir vinnararnir fáa nevnliga heimavøll í fjórðingsfinaluni saman við besta tvey'aranum.



*Klaksvíkingar hava tvær reisur tapt móti Skála, og tískil er kravið ein sigur, tá arvafíggindin úr HB kemur á vitjan leygardagin*

## Trý fara víðari

Í bólki 1 kann B36 staðfesta sína oddastøðu, tá NSÍ kemur á vitjan leygardagin. Havnarliðið er enn ósigrað í bólkaspælinum, og eins og oddaliðini í hinum bólkunum hevur árstalsfelagið 10 stig fyri fýra dystir.

Hóast VB er á næsta sessinum, so eru tað runavíkingarnir, sum á pappírinum hava besta møguleikan at vinna seg fram á oddasessin. NSÍ hevur nevnliga leikt ein dyst færri enn hini liðini, og kunnu tískil koma upp á 13 stig, um teir vinna seinastu tríggjar dystirnar.

Tað eigur heldur ikki at síggjast burtur frá, at skulu runavíkingarnir koma upp á annað plássið og harvið vissa sær víðari luttøku í kappingini, so krevur tað helst, at liðið í øllum førum fær eitt stig í Havn. Tað er ikki ilt at ímynda sær, at um so er, at B36 fær fulla úrtøku hesaferð, verður tað eitt heldur skert B36-lið, sum fer suður til Vágs í seinasta dystinum, soleiðis at lyklaleikarar ikki overva seg í einum dysti, sum tá er týdningarleysur.

Vágbingar hava hesa ferð heimadyst móti Sumba, og einki er at ivast í, at hetta á pappírinum er ein løtt uppgáva. VB vann stórsigur suðuri á krossinum fyrr í kappingini, og eitt nú móti B36 staðfestu sumbingar, at teir ikki formáa sær stórvegis, tá betra helvtin av fyrstu deild stendur hinumegin.

Við einum sigri í hesum dystinum kann VB skapa sær eitt sera gott útgangsstøði undan seinasta dystinum, tó at teir í ávísan mun mugu dúva upp á úrslitið í Havn.

Hvussu verður og ikki, so verður tað helst undir øllum umstøðum soleiðis, at trý lið koma víðari úr hesum bólkinum, tí tað er neyvan hugsandi, at Sumba fer at taka nakað stig yvirhøvur.

## GÍ og so hini

Hóast teir enn ikki eru matematiskt tryggjaðir, so munnul gøtumenn uttan iva vera liðið, sum stendur sterkast í myndini, nú tvey umført resta at spæla. Seks stig eru niður til øll hini liðini í bólkinum, og tískil tørvar gøtumonnunum bert eittans stig afturat, áðrenn víðari luttøkan er vís.

Og tað er einki at ivast í, at gøtumenn ætla sær at ogna sær hetta stigið, tá teir fara til Tvøroyri í einum dysti, sum gøtumenn eru heitir favorittar at vinna.

Spurningurin í bólkinum tykst soleiðis bert at vera, hvørt av hinum trimum liðunum skal vinna seg víðari. Her fellur ein avgerandi brikkur kanska upp á pláss, tá EB/Streymur vitjar vesturi í Vágunum, og í øllum førum hevur ein møguligur vinnari av hesum dysti vunnið seg eitt stórt fet nærri hálvfinaluni. Her hava vágamenn kanska tann fyrimunin, at teir sum einasta liðið hava leikt báðar dystirnar móti GÍ, og enntá hava fingið stig í øðrum teirra, so á pappírinum tykjast vágamenn standa sterkastir, og so skal heldur ikki gloymast, at nýggi brasiliumaðurin hjá liðnum eftir øllum at døma loksins verður við, nú tað av álvara gerst spennandi í bólkaspælinum.

## Lagnudagur hjá B68 og KÍ

Undan bólkaspælinum vóru fá, sum ivaðust í, at Skála fór at vera »prügelknabe« í bólki 3, har mótsøðuliðini vóru lið, sum tey flestu rokna við at síggja sum part av oddastríðnum í bestu deildini í summar.

Serstakliga KÍ hevur tó mugu ásannað, at Skála eisini kann geva mótstøðu, og lagar alt seg eftir vild um vikuskiftið, kann Skála tryggja sær atgongumerki til fjórðingsfinaluna leygardagin. Vinnur Skála dystin móti B68, samstundis sum KÍ ikki fær fulla úrtøku á heimavølli móti HB, so er munurin niður á triðja plássið somikið stórur, at Skála longu áðrenn landskappingin er byrjað, hevur skapt fyrstu veruligu sensatiónina á árinum.

Hesum fara fyrst og fremst toftamenn at berjast ímóti leygardagin, og hóast stigatalvan sigur nakað annað, so munnu tey flestu rokna B68 sum favoritt undan dystinum. Nakað sum uttan iva hóskar skálamonnum sera væl, soleiðis at teir kunnu dúva upp á sterku verjuna, samstundis sum skjótu álopsmenninir kunnu royna at gagnnýta teir kontramøguleikar, sum íkoma.

Harafturat hevur Skála tann fyrimun, at hóast teir ikki vinna hesaferð, so kann støðan undan seinasta dystinum vera tann, at HB longu hevur vunnið bólkin, og at Skála tí kann fáa ein munandi léttari dyst í seinasta umfarinum, enn teir fáa, um havnarliðið hevur tørv á øllum trimum stigunum.

Hjá KÍ er støðan á leið hin sama sum hjá B68. Gaman í hava klaksvíkingar eitt stig fleiri á kontini, fyri at koma víðari í kappingini, eru treytirnar harðar. Eftir øllum at døma skulu bæði heimadysturin móti HB og útidysturin móti B687 geva fulla úrtøku, um liðið skal vinna seg víðari. Hvørt tað so verður sum tvey'ari ella sum ein av bestu trý'arunum.

Eftir eina viku, sum onkursvegna hevur verið heldur baldrut, tykist friður nú at valda í KÍ-leguni, men tað ger neyvan uppgávuna móti HB lættari, at leikarar, sum vanliga teljast millum teir fyrstu 11, neyvan verða tøkir leygardagin. Allan Joensen varð skaddur, tá KÍ vann á B68, og hann er enn ikki komin heilt fyri seg. Tað tykist heldur ikki, sum um Jan Andreasen verður 100% klárur at spæla, og uttan tveir somikið týðandi leikarar, kann uppgávan móti einum fullmannaðum HB-liði gerast sera torfør, men hinvegin er eingin, sum hevur sagt, at fótbóltur skal vera eitt lætt spæl.

# Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

**Bólkur 1**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 16 | 2 | 14 | 10 |
| 2 | VB | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 8 | 8 | 0 | 6 |
| 3 | NSÍ | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 6 | 4 | 2 | 4 |
| 4 | Sumba | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 1 | 17 | -16 | 0 |

**Bólkur 2**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 8 | 2 | 6 | 10 |
| 2 | EB/Str. | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 4 |
| 3 | FSV | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 4 | 6 | -2 | 4 |
| 4 | TB | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 5 | 8 | -3 | 4 |

**Bólkur 3**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 11 | 5 | 6 | 10 |
| 2 | Skála | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 6 | 8 | -2 | 6 |
| 3 | KÍ | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 9 | 9 | 0 | 4 |
| 4 | B68 | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 6 | 10 | -4 | 3 |

# Dystir um vikuskiftið

FÓTBÓLTUR
*Kappingin um Løgmanssteypið*

**Bólkur 1**
13.04 B36-NSÍ Oddmar Andreasen
13.04 VB-Sumba Niklas á Líðarenda

**Bólkur 2**
13.04 TB-GÍ Eiler Rasmussen
13.04 FSV-EB/S Dagfinn Olsen

**Bólkur 3**
13.04 Skála-B68 Suni Johansen
13.04 KÍ-HB Petur Skarðenni

**Steypakappingin, kvinnur**
14.04 AB-FSV Ransin Djurhuus
14.04 NSÍ-Sumba Jónleif Gerðisá
14.04 B68-GÍ Jógvan A. Jacobsen
14.04 B71-Skála Hans F. Hansen